## Kreativ seyming í »Iktys«

Handilin »Iktys«, sum selir góð, brúkt klæðir, og hvørs ágóði fer til neyðstødd menniskju úti um heimin, fer nú undir nýtt tiltak. Frá 31. oktober og hvønn mikudag í november – frá kl. 16 til 17.30 verður ein føroyskur sniðgevi at hitta í handlinum. Her kunnu fólk so koma inn á gólvið og fáa vegleiðing í umseyming av klæðum. Tær sum sjálvbodnar fara at vegleiða í kreativari seyming, eru: Katrina í Geil, Elin Lindenskov, Katrin Bonde og Jóna Dalsgarð, ið allar arbeiða professionelt innan sniðgeving og seyming. - Vit minna eisini á, at fyrstu viku í november er tilboðsvika í góðum brúktum barnaklæðum fyri lítið og lætt, siga tey úr »Iktys«.



# Mentanin er besti vinnuli

**- Brúkar tú mentanina sum slóðbrótara og flaggskip, tá tú ætlar at gera vart við teg uttanlands, hevur tú nógv, nógv størri møguleika fyri at vekja ans og vælvild. Mentanin hevur tann eginleika, at hon kann skapa hugtakandi upplivingar, sum vekja góðar kenslur og gera fólk meira opin og álitisfull, segði Elin Heinesen, stjóri í Samvit, tá hon setti Mentanarvikuna sunnudagin**

VINNA OG MENTAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Elin Heinesen, stjóri í Samvit, sum setti Mentanarvikuna á torginum í Saltangará sunnudagin. Mentanarvika er sum kunnugt alla hesa vikuna í Runavíkar-økinum, samstundis sum vinnustevnan FaroExpo er í Ítróttarhøllini í Runavík og fyrilestrar í Kelduni í Skálafirði. Meðan Mentanarvikan varar frá sunnudegi 28. oktober til sunnudagin 4. november, er FaroExpo í dag og í morgin.



*- Vit mugu fáa mentanarlív og vinnulív til at draga somu línu til gagns fyri báðar partar. Hetta er avgjørt ein fyritreyt fyri at fáa ein sunnan búskap og trivnað fyri øll í samfelagnum, segði Elin Heinesen, stjóri í Samvit, tá hon setti Mentanarvikuna*

### Bleytt og hart

Í setanarrøðu síni setti Elin Heinesen fyrst spurningin:

- Hvat hava vinna og mentan við hvørt annað at gera?

Hon helt fyri, at nógv verður tosað um bleyt og hørð virði í hesum tíðum, og ofta verður tað lagt fram, sum um tað útihýsir hvørjum øðrum.

- Skulu vit hava vegir og tunnlar, kunnu vit ikki eisini keypa fleiri ljóðføri til skúlarnar ella seta fleiri starvsfólk á barnagørðunum – ella umvent. Hetta er undarligur hugsunarháttur. Eg havi ongantíð rættiliga skilt, hví nøkur virði skulu verða kallað bleyt og onnur hørð? Hví býta vit tað upp soleiðis? Er tað bara fyri at kunna keglast um tað? Kóka vit tað niður, snýr tað seg so ikki bara um at skapa umstøður fyri øll at trívast í? Trívast vit øll ikki best, tá vit hava eitt ríkt umhvørvi og eina breiða viftu av øllum tilboðum til bæði menn og kvinnur, børn og ung og eldri – bæði góðar vegir og tunlar, góðar ansingarmøguleikar, góðar ítróttarhentleikar og góðar umstøður til undirhald og felagsskap. Alt hevur virði fyri øll og einki er meira ella minni týdningarmikið enn annað.

Elin setti eisini spurningin, um fólk hava hugsað um, hví tey uppliva nakað sum virðismikið.

- Hvat eru virði? Virði er tað, tú velir at síggja sum virði. Virði snúgva seg júst um, hvussu tú eitt nú upplivir, hvussu tú sansar, sært, hoyrir og smakkar. Tá tú heldur, at okkurt sær gott út - smakkar væl – ella ljóðar ordiliga gott – ella at okkurt bara gevur tær eina góða kenslu onkusvegna. Tað eru vit menniskju – okkara upplivingar, sum geva tingum virði.

### Stórt vøruútboð

Hon helt, at fatanin av hesum samanhangi er vorðin heilt grundarleggjandi fyri at kunna gera seg galdandi vinnuliga í dag.

- Vøruúrvalið er so stórt í dag, og so nógvar vørur á marknaðinum eru so eins, at fólk kunnu í roynd og veru ikki meta um eina vøru bara eftir fysiskum eginleikum. Fólk meta og keypa fleiri og fleiri vørur eftir, hvussu tey »uppliva« vørurnar, og í hvørjum samanhangi, tey uppliva tær.

Hon helt, at vit eitt nú kunnu hugsa um, hví tær stóru fyritøkurnar úti í heimi – ja, sjálvt fyritøkur í so »hardcore« vinnum sum oljuvinnu ella bankavinnu – leggja so stóran dent á at skapa lekra sniðgeving ella góðar søgur um teirra vørur.

- Jú, sjálvandi tí tað er hetta, sum kundarnir ganga eftir.

Elin segði, at eisini hesar fyritøkur vita, at fólk keypa ikki vørur bara fyri at blíva heit ella mett. Tey keypa líka so nógv vørur fyri at keypa sær til góðar upplivingar, eina góða samvitsku, tey keypa sær ein identitet, ein samleika.

- Vit spyrja okkum sjálvi, um onnur fólk, sum okkum dámar væl, eisini keypa hesar vørur. Tey keypa sær okkurt, sum fær tey til at dáma seg sjálvi. Sær vøran gott út – ella rættari: Fær hon meg til at síggja gott út? Er tað ein »cool« merkivøra? Gevur hon mær prestigu? Hevur vøran eina áhugaverda søgu? Geri eg eina góða gerð við at keypa hana, er vøran vistfrøðilig – ella er talan um samhugakaffi?

Í røðu síni vísti Elin á, at fólk finnast, sum fegin keypa fartelefonir fyri tíggjutúsundatals krónur ella meir, sjálvt um tey kunnu fáa eina líka so dygdargóða fartelefon fyri fáar hundrað krónur. Bara tí tey halda, at tann dýra er »cool«, kanska tí hon er framleidd í fáum eintøkum og er hondgjørd.

### Mentan er ísbrótari

Og Elin helt fram:

- Vit kunnu bara hugsa um listina, hvussu nógvan pening listarverk kunnu fara fyri, men sum í tilfari ikki eru verd eina promillu av tí, tey verða keypt fyri.

Hon helt, at um vit vilja tjena pening í Føroyum, mugu eisini vit duga at spinna tað, sum vit hava at bjóða, inn í søgur, sum hugtaka fólk og fáa tey til at illeggja okkara vørum meira týdning ella meira virði, enn vøran í sær sjálvum ítøkiliga hevur.

Tað er her, at vit hava harðliga brúk fyri teimum kreativu – tí, sum mentanin hevur at bjóða.

- Hugsa bara um amerikanararnar. Teir fingu ikki heimsharradømi við at brúka ráa makt, hóast teir eisini hava roynt tað, tó ikki við serligum hepni. Nei, teir hava fingið heimsharradømi ígjøgnum tónleikin og filmarnar! Mentanin er tann allarbesti og munadyggasti ísbrótarin av øllum. Brúkar tú mentanina sum slóðbrótara og flaggskip, tá tú ætlar at gera vart við teg uttanlands, hevur tú nógv, nógv størri møguleika fyri at vekja ans og vælvild, tí mentanin hevur tann eginleika, at hon kann skapa hugtakandi upplivingar, sum vekja góðar kenslur og gera fólk meira opin og álitisfull.

Elin segði, at fleiri og fleiri gerast tilvitað um týdningin av mentanini fyri búskapin sum heild. Har